HOFF STOFF

# Væl fagnað í Elduvík

*Eisini í Elduvík fingu tey gávur – ikki óvæntað var malargrót við í gávuni*



HOFF STOFF
*Snorri Brend*
*myndir: Bárður*

**Elduvík:** Seinnapartin mikudagin átti henda heldur fjarskotna bygdin túrin til at fáa serstaka vitjan.

Eftir steðgirnar í Fuglafirði og Leirvík varð nú alt gjørt til reiðar, so at bygdarfólkið og onnur í hesi stóru kommununi, kundu taka ímóti drotningahjúnunum. Spenningur var bara um veðrið.

Fólk hugdu óført upp í luftina, tí tað var farið at tyngjast nakað í skýggjunum. Bara veðrið fór at halda sær, tí alt skuldi fyriganga uttandura í hesi náttúruvøkru bygdini. Tíbetur helt veðrið sær, til tiltakið í bygdini var nærum liðugt.

Hesa løtuna høvdu tey bæði fingið blómur, gávur, høvdu hoyrt føroyskan operasang, etið turran fisk, sæð menn draga bát í land og høvdu haraftrat fingið tveir málningar sum gávu frá kommununi.

## Hugnalig bygd

Tað var týðiligt, at fyrireikarnir ynsktu at vísa fólki, hvussu hugnaligt tað kann vera, eisini í so lítlari bygd.

Niðri í ánni lá ein lítil borðbátur og róði móti streyminum. Í bátinum vóru menn til árar í føroyskum klæðum, - til stóra frægd fyri tey vitjandi.

Longur heimi í bygdini sótu børn og hugnaðu sær frammanfyri eitt bál, sum var tendrað til høvið. Og har yviri við lendingina stákaðust fólk ófórt til hesa forkunnugu vitjanina.

Nú sóust bláu ljósini frá motorsúkklunum, og nú sást eisini svarta bilafylgið koma undan sýnini: Endiliga var vitjanin hjá teimum kongaligu komin til bygdina.

Tey koyrdu yvir móti støðni, har býráðsformaðurin, Rodmund Nielsen tók ímóti. Stutt eftir fekk Aksel Haraldsen høvið at heilsa uppá tey kongaligu, og føra tey oman móti støðni.

Tey steðgaðu á leiðini frammanfyri eitt skelti, sum vísti tað stóra arbeiðið sum bygdasavnið hevur gjørt fyri at varðveita hetta økið og byggja tað upp av nýggjum.

Hetta tóktist hava stóran áhuga fyri drotningahjúnini, tí tey lurtaðu við áhuga eftir tí, sum Aksel greiddi frá, og steðgaðu tí á eina góða løtu.

Niðri á støðni vóru stólar settir upp til hjúnini, og nú stóð tónleikur og sangur á skránni.



*Tey sita so fín og so spent og bíða eftir drotningahjúnunum – fv.: Torbjørn, Inga, Aksel, Bára, Dánjal, Ernst og Ásla*

## Fiskieydna

Men áðrenn tað skuldi ein bátur, "Sílið" dragast á land. Sílið við fýra monnum hevði fyrr um dagin sett tvær línur á sjálvari víkini, og nú skuldi fongurin fáast í land.

Tað sá út til at fiskieydnan hevði verið við teimum henda dagin, tí sjálvir mettu teir seg at hava fingið eini 300 pund og ein kalva. Hesin kalvin fangaði áhugan hjá Heindriki sum spurdi óført eftir, hvar tey høvdu sett línuna og hvussu leingi línan hevði staðið.

Hann gav eisini sítt boð til vektina á kalvanum, sum hann gott hevði kunnað hugsað sær at tikið við umborð á Dannebrog til eina máltíð.

Hann metti kalvan at viga eini 10 kilo – og sum skiltist á bátsmanningini var tað ikki heilt av leið. Teir mettu hann til 10-12 kilo.



*Ein bátur varð drigin á land, fullur av toski og kalva – eini 300 pund vá veiðan henda dagin. Hendrik tóktist sera áhugaður í at frætta nærri frá útróðrartúrinum*

## Sangur og málningur

Nú var so sangurin á skránni. Ætlanin var upprunaliga at hetta skuldi fara fram í sjálvari gjónni, men varð so kortini flutt á hetta staðið. Onkur helt at hetta var stórt spell, tí aukustikkurin í gjónni skal vera so sjáldsama góður.

Men niðri á støðni sang Rúni Brattaberg so tveir sangir og síðani tjóðsangin, væl stuðlaður av Meinhardi Bjartalíð á keyboardi, meðan drotningahjúnini hugnaðu sær við turrum fiski og øðrum afturvið. Aftaná heilsaðu tey uppá sangara og tónleikara, áðrenn leiðin gekk heim í bygdina, har tey fingu handað tveir málningar sum gáva frá Runavíkar kommuna, sum Elduvík er ein partur av.

Nú var so smátt byrja at regna, og tí var tað hóskandi at vitjanin var av á hesum sinni.

Ein stutt vitjan var at enda komin. Men kortini ein vitjan, sum bæði børn, ung og eldri munnu vera fegin um. Tað er ikki hvønn dag at kongaligir gestir koma til bygdina.

*Børnini vóru eisini spent uppá forkunnugu vitjanina – og høvdu riggað seg til hetta sjáldsama høvið*



jú eisini er ein partur av ríkisfelagsskapinum. Og at tey so haraftrat komu til Fuglafjørð, er bara eitt eyka pluss fyri alt, sigur sambandsmaðurin Helgi.